ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 21. januar 2010

# Gango helst til NSÍ

**Andras Gango, sum júst er givin í ÍF, hevur vant við NSÍ seinastu dagarnar. Sannlíkt er, at sáttmáli verður gjørdur millum partarnar**



Jákup Mørk

- Eftir at Meinhardt Joensen fór til Havnar, hava vit ongan málmann. Tí kom tað væl við at Andras Gango bjóðaði seg fram. Enn er eingin avtala gjørd, men eg vænti at vit fara at gera sáttmála við hann, sigur Andrias Lamhauge sambært kringvarp.fo.

Andras Gango hevur spælt við ÍF, síðani hann kom til Føroya, umframt at hann eisini hevur virkað sum málmansvenjari hjá føroyskum U-landsliðum.

Í fjør var tó ein ávísur kuril á tráðnum millum málverjan og felagið, og seinastu vikurnar hevur verið mest sum greitt, at tað ikki var í ÍF, at framtíðin hjá málverjanum var.

Andrias Lamhauge sigur víðari, at enn er allur hópurin hjá NSÍ ikki komin upp á pláss. Eitt nú er ikki vist, at felagið fer at gera sáttmála við Potemkin, sum kemur til landið í februar.

- Hann kemur aftur til Føroya í februar og tá fer hann at venja við okkum. So fáa vit at síggja hvussu tað verður, sigur formaðurin í NSÍ við heimasíðuna hjá Kringvarpinum.



Andras Gango venur nú við NSÍ, og helst verður tað eisini her, at hann fer at spæla fótbólt í ár5



**Støðan er broytt. Hóast hann fyri fáum mánaðum síðani segði, at hann vildi spæla KÍ upp aftur í fremstu røð, so sigur Jákup Mikkelsen nú, at motivatiónin við at spæla Vodafone-bólt í Fuglafirði er størri, enn hon er í Klaksvík og 1. deild**

# KÍ hevur tað betur uttan meg

**Møguleikin at taka eitt ár afturat á hægsta støði og sannføringin um, at KÍ er væl mannað á málverjasessunum vóru týðandi orsøkir hjá Jákupi Mikkelsen, tá hann skrivaði undir við ÍF**



Jákup Mørk

»Hetta var ikki mátin, sum eg ætlaði at enda uppá. Nú eru vit fluttir niður, og eg ætli mær at gera mítt til, at KÍ sum skjótast kemur upp aftur í fremstu deildina.«

Soleiðis segði Jákup Mikkelsen, tá tað eftir kappingarárið í fjør stóð greitt, at KÍ fyri fyrstu ferð í søgu felagsins mátti niður í 1. deild at spæla komandi kappingarár.

Seint í gjárkvøldið skrivaði Jákup Mikkelsen undir sáttmála við ÍF, og við hesum er greitt, at tað verður uttan Jákup Mikkelsen, at KÍ skal royna at vinna seg uppaftur.

- Tað er eingin einføld orsøk til, at eg skifti til ÍF. Teir settu seg í samband við meg fyri eini viku síðani ella so, men eg vildi ikki taka støðu alt fyri eitt. Støðan kring KÍ hevur verið rættiliga turbolent seinastu vikurnar, og fyrst og fremst vildi eg tryggja mær, at alt rokið kring venjaramálið var av, áðrenn eg tók støðu til, hvar mín framtíð lá.

- Nú er so friður á tí økinum, og so havi eg hugsað um, hvat var best at gera. Eisini fyri KÍ, sum eg haldi vera væl stillað á málverjaplássinum, nú Gunnar á Steig er komin aftur til felagið, og har vit eisini hava Eilir Arge sum ein framtíðar málverja. Á tann hátt er kanska meira perspektiv í, at tað er ein annar málverji enn eg, sum stendur millum stólparnar hetta kappingarárið, sigur Jákup Mikkelsen.

Og hvussu við tær sjálvum. Er hetta samstundis ein møguleiki hjá tær at taka eitt ár afturat á hægsta stigi?

- Sjálvandi er tað tað. Nú havi eg spælt í somikið nógv ár í bestu deildini. Og tí er tað avgjørt ein stórur motivatiónsfaktorur, at tað verður í fremstu røð, at eg skal spæla.

- Enn kenni eg ikki tað heilt stóra til hópin hjá ÍF. Eg kenni sjálvandi Abraham Løkin, sum er venjari, og Rógva Jacobsen, og teir báðir eru bæði ídnir og nærlagdir. Og í aðrar mátar haldi eg, at hópurin hjá teimum sær rættiliga spennandi út, so hetta er avgjørt ein avbjóðing, sum eg gleði meg til, sigur Jákup Mikkelsen.

Umframt Jákup Mikkelsen hevur ÍF eisini havt Eyðun Madsen sum málverja. Sum skilst er tó ivasamt, hvussu nógv hann ger við fótbóltin í ár, men Fróði Poulsen, sum hevur verið til sjós, verður eisini millum málverjarnar.

## FAKTA

### Jákup Mikkelsen

**Føddur:** 14. august 1970

**Spælt við:**

| | |
|---|---|
| -1994 | KÍ |
| 1994-2001 | Herfølge (DAN) |
| 2001-2003 | Molde (NOR) |
| 2003-2004 | Partick Thistle (SKO) |
| 2004 | KÍ |
| 2005-2007 | B36 |
| 2008-2009 | KÍ |
| 2010-? | ÍF |

Hartil 67 landsdystir fyri Føroyar

### Vunnið

| | |
|---|---|
| **FM:** | 1991 (KÍ) |
| | 2005 (B36) |
| **Løgmanssteypið:** | |
| | 1994 (KÍ) |
| | 2006 (B36) |
| **DM:** | 2000 |